## Ársaðalfundur í P/F Atlantic Petroleum

Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Atlantic Petroleum at verða á Hotel Føroyum, við Oyggjarvegin 45, 100 Tórshavn **leygardagin tann 29. mars 2008 kl. 10.00** við hesi fundarskrá:

**1. Val av fundarstjóra.**
**2. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.**
**3. Framløgu av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.**
**4. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin og ársfrágreiðing.**

Nevnd felagsins mælir til, at hallið sambært góðkenda roknskapin verður flutt fram til næsta ár.

**5. Val av nevnd.**

*Tríggir nevndarlimir standa fyri vali fyri eitt 2 ára skeið. Teir tríggir nevndarlimirnir sum standa fyri vali eru Kjartan Hoydal, Mortan Johannesen og Óli Hammer. Nevndin skjýtur upp afturval av teimum trimum limunum.*

**6. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.**

*Sum er hevur felagið tveir grannskoðarar, P/F Grannskoðaravirkið INPACT statsaut. reviso-rar og Sp/f SPEKT statsaut. revisorar. Broyting er farin fram í lóggávu galdandi fyri felagið og er nú bert ein grannskoðari lógarkravdur. Sambært § 20 í viðtøkum felagsins skulu veljast upp til tveir grannskoðarar.*

*Nevndin skjýtur upp bert at velja ein grannskoðara fyri felagið og skjýtur upp at valdur verður P/F Grannskoðaravirkið INPACT statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn at sita til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.*

**7. Viðtøkubroytingar.**

Nevndin skjýtur upp fylgjandi viðtøkubroyting:

§ 3 stk. 2, pkt. 7, ið hevur hesa orðing: "Tekning fer fram til marknaðarvirði", verður broytt til hetta innihald:

*"Um boðið verður til tekningar av nýggjum partapeningi uttan fortekningarrætt fyri verandi partaeigarar, skal tekning fara fram til marknaðarvirði."*

Í aðramáta verður § 3 óbroytt.

Til samtyktar av uppskotinum til viðtøkubroyting krevst smb. § 78 stk. 1 í partafelagslógini at uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og av tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum.

**8. Ymiskt**

---•---

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum.**
Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum fer fram umvegis heimasíðu felagsins www.petroleum.fo ella á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn ella á tlf nr. + 298 350 100 og/ella telefax nr. + 298 350 101. Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum er **týsdagin tann 25. mars 2008 kl. 16.00.**

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva øðrum skrivliga fulltrú til at møta tygara vegna. Á heimasíðu felagsins www.petroleum.fo, umframt á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn, kunnu tygum útvega tygum eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi.

**Ársroknskapurin 2007 og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum.**

Ársroknskapurin 2007 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum koma at liggja frammi á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Partapeningur, atkvøðurættur og kontoførandi peningastovnur.**

Partapeningur felagsins er kr. 112.573.000 býttur sundur í partabrøv á kr. 100 og multipla av hesum.

Í § 5 stk. 1 í viðtøkunum er ásett, at partaeigararnir hava 1 atkvøðu fyri hvørjar kr. 100 teir eiga í partapeningi.

Í § 2 stk. 2 er ásett, at eingin partaeigari kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20% av atkvøðunum.

§ 11 í viðtøkum felagsins er soljóðandi:

*"Hvør partaeigari hevur rætt til at møta á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum hevur biðið felagið um atgongumerki.*

*Atkvøðurætt á aðalfundinum hava partaeigarar, sum í seinasta lagi 5 dagar undan aðalfundinum hava biðið felagið um atgongumerki og atkvøðuseðil.*

*Partaeigari kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.*

*Atgongd til aðalfundin hava harumframt fjølmiðlarnir."*

Felagið hevur kosið sær Eik Banki P/F til kontoførandi peningastovn og kunnu parteigarar felagsins venda sær til henda peningastovn á adressuni Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn ella á heimasíðuni www.eik.fo ella á telefon nummar + 298 348 000 fyri at útinna fíggjarligu rættindi síni í felagnum.

Atlantic Petroleum

P/F Atlantic Petroleum
Nevndin

## Páskastevnan
FRÍKIRKJAN OASAN 2008

*Skírishósdagur 20. mars*

| | |
|---|---|
| Kl. 1900 | Kvøldmøti við Jerome Ocampo<br>Sangur: Bjarni, Judith og Jannet |

*Langi fríggjadagur 21. mars*

| | |
|---|---|
| Kl. 1000 | Morgunmøti við Annabellu Ocampo<br>Sangur: Oasubrøðurnir |
| Kl. 1900 | Kvøldmøti við Jerome Ocampo<br>Sangur: Sigrið & Co |
| Kl. 2230 | Ungdómstiltak, har Oasan hevur lovsang og Håvard Berger talar |

*Páskaaftan 22. mars*

| | |
|---|---|
| Kl. 1400 | Seminar fyri gentur og dreingir, har tey norsku skipa fyri |
| Kl. 1900 | Kvøldmøti við Jerome Ocampo<br>Sangur: Tórfríð Tausen |
| Kl. 2230 | Ungdómstiltak, har tey norsku hava leiðslu, lovsang, talu, vitnisburðir og dans/drama |

*Páskadagur 23. mars*

| | |
|---|---|
| Kl. 1000 | Morgunmøti við Símun Jacobsen<br>Sangur: Terji Vestergård |
| Kl. 1500 | Familjumøti |
| Kl. 1900 | Kvøldmøti við Jerome Ocampo<br>Sangur: Ekklesia |
| Kl. 2230 | Ungdómstiltak, har Filadelfia hevur lovsang og Håvard Berger talar |

2. *Páskadagur 24. mars*

| | |
|---|---|
| Kl. 1000 | Morgunmøti við Håvard Berger<br>Sangur: Hanna og Terji |
| Kl. 1800 | Kvøldmøti við Jerome Ocampo<br>Sangur: Eyðun Jacobsen |

## Grundstykkir til sølu

Matr. nr. 340a, 521, 520, 313c og 353c,
tilsamans 31.000 fermetrar við Gjógvaráveg í bústaðarøkinum B1 í Vági



***Ein trygg íløga í framtíð og egið lív.***

Áhugaði ringið til Jákup Joensen, 926 Lopra, tlf. 373305 ella 227460